

SOZOPREPRESS

# LANDS APOTEKARI

## Starvið sum landsapotekari verður við hesum lýst leyst til setan 1. juni 2011 ella eftir nærri avtalu.

Landsapotekarin er ovasti leiðari fyri apoteksverkið og hevur mótvegis Heilsumálaráðnum endaligu ábyrgdina av virkseminum.

### Um starvið

**Uppgávurnar eru í høvuðsheitunum hesar:**

· ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, ígongdseting og samskipan av arbeiðsuppgávunum í apoteksverkinum

· ábyrgd fyri støðugari menning í apoteksverkinum soleiðis at apoteksverkið á heilivágsøkinum livir upp til nútíðarkrøv.

· ábyrgd fyri gerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri stovnin.

· ábyrgd av, at góðkend fíggjarætlan verður hildin.

· ábyrgd fyri at hagtøl fyri samlaðu heilivágsnýtsluni í føroyska samfelagnum eru tøk.

· ábyrgd at røkja nærri útgreiðnaðar myndugleikauppgávur og ráðgeva Heilsumálaráðnum um heilivág í síni heild, Eftirlit við at løggávan viðvíkjandi apoteksverkinum v.m. verður hildin dagførd.

· ábyrgd av samstarvi um heilivágsviðurskifti við útlendskar stovnar og myndugleikar.

### Førleikakrøv

Landsapotekarin skal hava staðið danskt farmaseutiskt kandidatprógv ella samsvarandi prógv, sum er góðkent at lúka sáttmála við onnur lond. Harumframt verður kravt, at viðkomandi í starvi hevur víst seg skikkaðan at reka apotek.

Tann rætti umsøkjarin skal harumframt hava:

· áhuga og vitan um heilsuverkið í síni heild

· góð leiðslu- og samstarvsevni

· ein mennandi leiðslustíl

· evni at seta í verk fyriskipanir

· vitan um fíggjarstýring og heilsubúskap

· góð samskiftisevni í skrift/talu

### Lønar & setanartreytir

Setanarøkið er Apoteksverkið og Heilsumálaráðið við undirliggjandi stovnum. Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum, bæði í starvsinnihaldi og vavi.

Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Heilsumálaráðnum. Lønin er ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pharma Danmark.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á t-posti: poul.geert.hansen@hmr.fo ella tel 30 40 50.

### Umsókn

Umsókn við CV og avriti av neyðugum skjølum skal sendast til:

**Heilsumálaráðið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Umsóknarfreist:
**30. mei 2011 kl. 12.**

**Heilsumálaráðið**
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn, tel 30 40 50,
fax 30 40 25, hmr@hmr.fo, www.hmr.fo